# FÓLKIÐ FYRST

**Valevnislistin í Eysturoy:**

William Max Hansen
Sunleiv Højgaard
Sylverius Jacobsen
Artur Johansen
Randi í Jógvanstovu
Katrin Jønsson
Andreas Petersen
Dan Reinert Petersen

**Valevnislistin í Norðstreymoy:**

Soffi Egholm
Gunnvá Mortensen
Hans Jákup Simonsen
Hans Pauli Strøm

**Valevnislistin í Vágum:**

Kristoffur Gaardlykke
Malan Helgadóttir
Rasmus Niclassen
Sigfríður Olsen

**Valevnislistin í Suðuroy:**

Jóannes Eidesgaard
Rúni Lisberg
Sverre Midjord
Jastrid Nielsen
Henrik Old
Eliesar Poulsen
Mikkjal Sørensen



**Valevnislistin í Norðoyggjum:**

Kaj Boetius
Jákup á Fløti Jacobsen
Vilhelm Johannesen
Jógvan Páll Poulsen
Eyðgunn Samuelsen
Torleif Sigurðsson
Mamy Dahl Sørensen

**Valevnislistin í Suðurstreymoy:**

Thomas Arabo
Bergur Dam
Eyðólv Dimon
Katrin D. Jakobsen
Elin Lindenskov
Kristian Magnussen
Jan Midjord
Bartal Nolsøe Poulsen
Kári Petersen
Hendrik Thomsen
Joan Ziskason

**Valevnislistin í Sandoy:**

Eyðstein Dalsgaard
Tummas Frank Joensen
Gerhard Lognberg
Birgir Mohr

JAVNAÐARFLOKKURIN




# Losjan í Havn 100 ár

FØÐINGARDAGUR
*Ingrid Bjarnastein*



*Losjan í Havn fyllir tann 1. maj 100 ár*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tann 1. maj í 1902 varð losjan "Støt Viljen" í Havn sett á stovn. Í hesum sambandi bjóðar Losjan almenninginum til drekkamunn í Losjuni á Tinghúsvegi 18, sjálvan føðingardagin, mikudagin 1. maj. Byrjað verður klokkan 15.30 til klokkan 18.30.

Eisini verður ein framsýning við myndum frá farnu 100 árunum. Serlig sýning og søga um losjuflaggið úr bláum silki, sum júst hevur verið til umvælingar hjá konservartori í Svendborg verður eisini á skránni. Um hesa flaggsøgu eru áhugaverd skjøl, og J. Dahl, próstur, týddi ein sálm til føroyskt til hetta høvið. Sálmurin stendur í sálmabókini. Sett verður eisini upp til losjufund í losjusalinum, har gerðabøkur og annað verður til skjals. Í heyst verður bók útgivin um Goodtemplararørsluna í Føroyum.

# Meiri ljós í SMS

**Fyrsta byggistig av umbyggingini í SMS hevur nú veruliga tikið dik á seg**

UMBYGGING
*Ingrid Bjarnastein*

Onkur hevur helst lagt til merkis, at okkurt gongur fyri seg á takinum í SMS.

– Hetta er fyrsta byggistig av stóru umbyggingini av SMS, sigur Hans Mortensen, stjóri. – Vit byggja ein rygg, soleiðis, at meira ljós kemur á gongsøkið í SMS. Soleiðis verður tað eisini ljósari inni.

Tvær tær norðastu lonirnar verða broyttar í erva. Tær verða renoveraðar og ístandsettar. Hetta er tað, ið verður gjørt við, at Perlan fellur burtur, og Sunset Boulevard, Burger King og ein steak-matstova koma ístaðin fyri.

Eftir ætlanini skal hetta vera liðugt í september mánaða, og higartil heldur tíðarætlanin.



*Fyrsta byggistig av umbyggingini í SMS er nú væl áleiðis*
*Mynd: Jens Kr. Vang*


BYGG IKKI Á LYGNIR - BYGG EGIÐ LAND!

TIL ERU TRÝ SLØG AV LYGNUM: HVÍTAR LYGNIR, GROVAR LYGNIR OG LÍVSLYGNIR

HVÍTA LYGNIN

Sambandsflokkarnir siga, at teir vilja verja vælferðina.
Tað er ein **hvít lygn** fyri at tú skalt velja teir, so teir kunnu tøma landskassan og koyra landið á heysin aftur. Tá missur tú alla vælferð, eins og seinast teir søgdu, at sambandið við Danmark skuldi bjarga okkum.

GROVA LYGNIN

Sambandsflokkarnir siga, at tú kanst ikki útbúgva teg ella fáa sjúkrahjálp úr Danmark, tá vit eru eitt sjálvstøðugt land.
Tað er ein **grov lygn**.
Vit hava óskerdan rætt til útbúgving í Danmark og øðrum Norðurlondum, tá vit eru eitt sjálvstøðugt land. Og vit kunnu tá fáa betri útbúgvingarmøguleikar um allan heim.
Vit gjalda fullan prís fyri alla sjúkrahjálp í Danmark longu í dag. Tá vit eru sjálvstøðugt land, gjalda vit framvegis fyri sjúkrahjálp í Danmark og øðrum londum, og okkara egna sjúkrahúsverk fer at mennast í beinleiðis samstarvi við onnur lond.

LÍVSLYGNIN

Sambandsflokkarnir siga, at vit megna onki á egnum beini. At vit skulu selja okkara sjálvræði til Danmarkar, og at vit ikki kunnu samstarva við Danmark sum tvey sjálvstøðug lond.
Tað er ein **lívslygn**.
Allur framburður í Føroyum er skaptur, tá føroyingar hava staðið saman og tikið ábyrgdina í egnar hendur. Og viðurskiftini við Danmark eru bara vorðin betri, har vit hava tikið fulla ábyrgd.
Hygg bara at stríðnum um at vinna føroyskum máli viðurkenning. Hygg at stríðnum um fiskimarkið. Hygg at stríðnum um undirgrundina. Hygg at vinnulívsmenningini í Føroyum. Hygg at fótbóltslandsliðnum, svimjingini, fimleikinum og øðrum ítrótti. Hygg eftir okkara mentanarlívi.
Alt hevur grógvið og ment seg, tá vit tóku egna ábyrgd.
Og hygg at, hvat tú hevur megnað at skapt seinastu 4 árini á fullveldiskósini við minkandi blokkstuðli. Ongantíð hevur verið størri framburður á øllum økjum. Ongantíð eru størri sosialar betringar hendar. Ongantíð hevur verið betri skil í búskapinum. Og kring allan heim gera føroyingar vart við seg.
Tú eigur heiðurin av tí, sum er bygt. Tú hevur avdúkað lygnirnar. Tú hevur bygt land.

Heimurin liggur opin og frælsið er nærri enn nakrantíð.
Vit seta álitið á teg.
Vit vita, at tú fert ikki at byggja lívið á lygnir og olmussu.
Vit vita, at tú vilt byggja egið land.

UNGA TJÓÐVELDIÐ
- SAMBAND VIÐ ALLAN HEIM